Vikuskiftis Sosialurin



## Stuðulskonsert fyri nýggjum Blákrossheimi

Leygarkvøldið 8. novembur verður ein stór stuðulskonsert í Vesturkirkjuni til frama fyri nýtt Blákrossheim. Tey, sum luttaka, eru Jens Lisberg, Martin Joensen, Kristel Lisberg og VOX. Stuðulskonsertin byrjar í Vesturkirkjuni klokkan 20.00. Tað er ókeypis at koma á konsert, men høvi verður at geva eina gávu til nýggja Blákrossheimið.



## Fyrra síðan

Velja staðbundna nevnd í Svínoy
Við valið til býráðið í Klaksvík 11. november verður eisini høvið hjá veljarunum at velja síni umboð í tær staðbundnu nevndirnar. Hetta er áður gjørt í Mikladali, Trøllanesi og í Árnafirði, men nú svínoyingar gerast partur av teirri stóru kommununi, skulu teir á fyrsta sinni velja sína staðbundnu nevnd. Listar eru komnir inn frá øllum fýra bygdunum, og verða teir kunngjørdir í næstum.



22.10.08

Til. Sosialurin

Vedr: Dialog (MHT. Interview)

Jeg skriver til Sosialurin MHT. at etablerer en dialog.
Jeg ved jo ikke hvem der er den rigtige person/journalist til at skrive til, så jeg anmoder herved at Sosialurin kontakter mig.

Jeg mener at jeg er blivet misforstået og derfor fortjener chancen til at forklare/forsvare mig.
Altså, når jeg nu bliver løsladt i nogle (få) år, så kan jeg jo ikke bare komme hjem til Færøerne (når alle er i mod mig!) ... Jeg elsker Færøerne og det er mit nye hjem.

Jeg håber vi kan etablerer en dialog.

MVH...
Bjarne Skounborg / Peter Lundin



Prenup

Jeg Bjarne Skounborg [redacted]
lover herved at

(1) Beholde alt min gæld ...

(2) Frasiger mig enhver rettighed over ...

[redacted]

*Brævið frá Peter Lundin, sum Sosialurin fekk sendandi í morgun, er samanborið við »prenup'ið«, sum hann skrivaði í sambandi við hjúnarlagið við Mariannu Poulsen. Hóast vandi altíð kann verða fyri eftirlíkningum meta vit út frá hondskrift og brævbjálva, at hetta brævið verðuliga er skrivað av Peter Lundin*

# Føroyar

**Tað sigur Peter Lundin í brævi til Sosialin, har hann biður um at sleppa til orðana, tí hann heldur seg vera misskiltan. – Jeg elsker Færøerne og det er mit nye hjem, skrivar Peter Lundin**

LUNDINMÁLIÐ

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað var eitt rættiliga óvanligt bræv, sum kom við postinum til Sosialin í morgun. Øll spílaðu eyguni upp, tá undirskriftin stóð greið. Brævið var frá Bjarne Skounborg/Peter Lundin.

Hann sigur í brævinum, at hann ynskir at »etablere en dialog« við »mht interview«.

Peter Lundin gjørdist av álvara kendur í Føroyum fyri fáum vikum síðani, tá tað kom fram, at føroyska Mariann Poulsen í loyndum hevði gift seg við honum.

Søgan hjá Lundin er annars ikki serliga tespilig. 7. apríl 1991 kvaldi hann mammu sína og gravaði hana niður á einari strond við Cape Hatteras á amerikansku eysturstrondini.

Fyri hesa ógerð varð Peter Lundin dømdur 20 ára fongsul, sum tó seinni varð sett niður í 15 ár. Men av tí at trongligt var í fongslinum, varð hann leyslatin eftir 7 ára fongsul – í juni 1999 – og vístur av landinum.

Komin heim aftur til Danmarkar nýtti hann bert eitt ár, áðrenn hann drap sambúgvan, Marianne Pedersen og báðar synir hennara 16. juni 2000. Hann skar øll trý líkini sundir í pettir, koyrdi partarnar í plastposar og beindi teir burtur.

Eingin farvegur hevur verið at sæð eftir líkpørtunum síðani.

### Kundi dømast

Tá rættarsakin móti Peter Lundin skuldi byrjað, varð hann av Rættarlæknaráðnum sagdur ikki at vera sinnissjúkur, og kundi tí standa vanligan rætt, tað merkir forvaring ella tíðarbundna revsing.

Ákærumyndugleikarnir kravdu tíðarbundna revsing, tí tað vanliga merkir longri fongsulsrevsing enn forvaring. Nevningarnir fylgdu ynskinum frá ákærumyndugleikunum, og dømdu Peter Lundin lívslanga fongsulsrevsing.

Meðan Lundin sat í fongsli í USA gjørdi ein donsk sv-støð eina samrøðu við Peter Lundin, har hann hevði málað helvtina av andlitinum svarta og hina helvtina hvíta, fyri at ímynda tað góða og tað ónda.

Í sambandi við hesa samrøðuna gav læknin Sten Levander honum 39 stig á sonevnda »psychopathy-checklist«, sum hevur ein skala frá 0-40. Hann verður sostatt mettur sum eyðsýndur psykopat.

Meðan Peter Lundin, sum nú nevnir seg Bjarne Skounborg, hevur sitið í fongsli, hevur hann stevnt dagblaðnum »Information« fyri at hava kallað hann psykopat, men tað rættarmálið tapti hann.

Hann varð í fjør fluttur frá Herstedvester fongslinum til Statsfængslet Østjylland í Horsens, eisini nevnd Horsens Statsfængsel.

### Kvinnutekki

Tað er ein kend søk, at hópdrápsmenn bergtaka manga kvinnu, og fangar á deyðsgongunum í fongslum í USA fáa í hópatali av brøv-